Vegleiðing til veiðiváttan avgreiðslugjald

Í samband við broytingar í skipanini fyri veiðiváttanir er nú innført eitt avgreiðslugjald, sum er ásett í kunngerð nr. 161 frá 23. oktober 2025. Hendan vegleiðing er ætlað sum hjálp til at skráseta gjaldskort og hvussu ein ber seg at, tá gjaldið av einhvørjari orsøk ikki verður goldið.

Skráset gjaldskort

Tá ið tú hevur ritað teg inn á Greipuna (greipan.fo) skal tú velja “Gjøld” í valmyndini á vinstru síðu.

Síðani velur tú “Skrásett gjaldskort”

Hendan síðan vísir eitt yvirlit yvir øll skrásett gjaldskort. Fyri at skráseta eitt nýtt gjaldskort skal tú velja “Skráset gjaldskort” ovast á síðuni. Neyðugt er at góðtaka treytirnar, áðrenn farið verður víðari.

Tú verður nú førd/ur víðari til síðuna `payment.quickpay.net`, har tú skal skráseta gjaldskortið. Upplýsingar verða einans skrásettir hjá Quickpay, og Vørn sær ikki hesar upplýsingar.



Tá tú hevur skrásett gjaldskortið, verður hetta víst undir skrásett gjaldskort. Nýggja gjaldskortið verður sett sum tað aktiva gjaldskortið í samband við framtíðar gjøld. Til ber at velja annað gjaldskort sum “aktivt” við at seta flugubein í tað gjaldskortið, sum skal vera aktivt framyvir.



Gjøld fyri veiðiváttanir

Tað er gjørligt at síggja yvirlit yvir veiðiváttanargjøld í Greipuni.

Á hesum yvirliti ber eisini til at gjalda fyri veiðiváttanir, sum av einhvørjari orsøk ikki eru goldnar sjálvvirkandi. Fyri at gjalda fyri eina veiðiváttan manuelt, skal man trýsta á gjaldskort ikonið.

Gjøld fyri veiðiváttanir

Id	Móttikið	Støða	Slag	Viðmerking	Prísur	Gjald
63224	18.11.2025 11.57.20	Gjald miseydnað	Veiðiváttan	1	250,00 DKK	
84	17.11.2025 11.02.58	Goldið	ReExport (Annex IV2)		250,00 DKK	

Gjald miseydnað

Um einki virkið gjaldskort er skrásett og ein veiðiváttan verður umbiðin, verður ein teldupostur sendur til teldupostadressuna, sum hoyrir til brúkaralykilin, sum er skrásettur undir Uppsetan > Brúkari > Lykil. Telduposturin er ein fráboðan um, at gjaldið miseydnaðist. Umbønin um veiðiváttan verður ikki viðgjørd av Vørn fyrr enn hetta er goldið.

Orsøkirnar til, at gjaldið ikki fór ígjøgnum sjálvvirkandi kunnu vera fleiri. Sum tað fyrsta kann tað vera tí, at einki gjaldskort er knýtt at hesum brúkaranum. Tað kann eisini vera tí, at kortið, sum er skrásett, er útgingið, og tískil skal eitt nýtt gjaldskort skrásetast. Tað kann eisini koma fyri, at einki av gjaldskortunum, sum eru skrásett, standa at vera “aktiv”. Tá er neyðugt at seta flugubein útfyri tað kortið, sum skal vera aktivt. Til seinast kann gjaldið eisini miseydnast, um undirliggjandi skipanin til kort-gjøld er óvirkin ella ikki er tøk t.d. tá Nets ella Visa ger planlagdar dagføringar.